# Orðing av eldrapolitikki

## Útgreining
## Øki 4 Norðoyggjar

**Starvsbólkur:**
**Hans Jákup Kallsberg, Viðareiðis Kommuna**
**Heini O. Heinesen, Kunoyar Kommuna**
**Turið Zachariassen, Hvannasunds Kommuna**
**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Kl. Kommuna**
**Elsba Lützen, Nærverkið**
**Per Johannessen, Nærverkið**
**Anna Maria Joensen, skrivari**

## Arbeiðssetningur starvsbólkur innan eldraøkið

1. **Støðulýsing – Lýsing av eldrarøktini í økinum.**

### A. Hvørji tilboð og tænastur verða veittar í dag innan eldrarøktina í økinum?

***A1. Hvørji tilboð/virksemi hava kommunurnar sjálvar?***

- Klaksvíkar Kommuna (KK) hevur í dag eitt Dagtilhald fyri eldri, kallað Sóljan. Tvey fólk starvast í Sóljuni.
- Eitt virkishús fyri borgarar yvir 60 ár, kallað Smæran.
- Eina Serflutningsskipan. Eitt starvsfólk er knýtt til Serflutningsskipanina.
- Sambýlið á Heygnum heldur til í bygningi sum er ogn hjá Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku.
- Sambýlið í Bøgøtu, sum heldur til í leigaðum hølum, .
- Eldraíbúðir undir Kráarbrekku; hetta eru íbúðir til borgarar yvir 60 ár. Íbúðirnar, sum eru 24 í tali, verða umsitnar av Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku.
- Eldrasvimjing er eitt tilboð til pensjónistar, sum Klaksvíkar Svimjihøll bjóðar.
- KK hevur eisini fleiri kvøldskúlatilboð til eldri borgarar.
- Hinar kommunurnar í økinum hava ikki beinleiðis tilboð til eldri, men kvøldskúlaskipan er tó í Hvannasunds og Viðareiðis kommunum.
- Eldraráð er í KK, hetta ráð kann ráðgeva og vegleiða kommununi innan eldrapolitikk.

***A2. Hvørji tilboð/virksemi samstarva kommunurnar um?***

- Kommunurnar í Norðoyggjum samstarva um hesar stovnar:
  - Dagtilhaldið Sóljan, har KK rindar raksturin,
  - Virkishúsið Smæran, har KK rindar raksturin,
  - Serflutningsskipanina, har KK leggur út og sendir rokning til grannakommununnar eftir nýtsluni, og
  - eldrasambýlini, har KK leggur út og sendir rokning til grannakommununnar eftir nýtsluni.
- Kommunurnar í Norðoyggjum eru saman í sjálvsognarstovnunum fyri Norðoya Ellis- og Røktarheim og fyri Norðoya Vistarheim, har kommunurnar velja síni umboð í stýrini.

***A3. Hvørji tilboð hevur landið?***

- Norðoya Ellis- og Røktarheim, 50 *starvsfólk (30,65 ársverk), 32 búpláss og 4 umlættingarpláss.*
- Norðoya Vistarheim, 16 *starvsfólk (9,9 ársverk) og 11 búfólk.*

- Dagtilhaldið á Búðatrøð (eitt tilboð fyri borgarar við demens), 4 *starvsfólk (2,8 ársverk) og 10 brúkarar.*
- Ven og Virka (eitt rørslutilboð fyri eldri) 2 s*tarvsfólk (1 ársverk) og 120 brúkarar.*
- Heimatænastan, ið umsitur eldrarøktina 32 *starvsfólk (24 ársverk) og 250 brúkarar*
- Matarskipan til pensjónistar, 2 starvsfólk (1 ársverk) og 60 brúkarar eru tilknýtt skipanini.

**B. Hvussu er tænastan bygnaðarliga skipað?**

- *Nærverið:Sí faktayvirlit.*
- *KK: Sí faktayvirlit*
  *Verandi bygnaður er merktur av, at tað eru fleiri ymiskir myndugleikar, sum býta ábyrgdina av eldraøkinum sínamillum, har annar parturin (KK) hevur íløgur og rakstur, meðan hin (Almannaverk) hevur tað fakliga og lønirnar.*
  *Harumframt eru í skipanini nakrir sjálvsognarstovnar, sum eiga og reka nakrar av stovnunum (bygningunum), og hetta ger bygnaðin enn meira samansettan og ógjøgnumskygdan.*
  *Nevndu viðurskifti eru torfør at tekna inn í bygnaðaryvirlit (faktayvirlit), sum tí eru ein einfaldgering av veruleikanum – tí hesar viðmerkingar.*

**C. Hvussu eru ognar- og rakstrarviðurskiftini á røktarheimum, sambýlum, tilhaldum o.ø. í økinum?**

- Norðoya Ellis- og Røktarheim er sjálvsognarstovnur við stýri, sum eigur bygningin. Stýrið er mannað við umboðum fyri kommunurnar í Norðoyggjum. Raksturin verður goldin av landinum.
- Norðoya Vistarheim er sjálvsognarstovnur við stýri, sum eigur bygningin. Stýrið er mannað við umboðum fyri allar kommunurnar í Norðoyggjum. Raksturin verður goldin av landinum.
- Sambýlið á Heygnum - bygningurin er ogn hjá Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku, sum er stovnaður av KK, Vistarheimsnevndini og Íbúðargrunninum.
  KK rindar fyri rakstur, húsaleigu og náttarvakt. Landið rindar fyri aðrar lønir.
- Sambýlið í Bøgøtu heldur til í leigaðum hølum. KK rindar fyri rakstur, húsaleigu og náttarvakt. Landið rindar fyri aðrar lønir.
- Dagtilhaldið á Búðatrøð er tilboð, sum er fíggjað innan játtanina hjá Norðoya Ellis- og Røktarheimi.
- Ven og Virka – Ognari av hølunum er KK. Landið rindar fyri lønir og amboð, fíggjað innan játtanina hjá Heimatænastuni. KK rindar fyri rakstur av hølum.

- Dagtilhaldið Sóljan – Ognari av hølunum er KK, sum rindar bæði fyri lønir og rakstur.
- Serflutningsskipanin – Ognari av bussinum er KK, sum rindar fyri løn og rakstur. Landið letur stuðul til koyring av avlamnum.
- Eldraíbúðir undir Kráarbrekku – Ognari er Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku. Leiguinntøkur fíggja raksturin.
- Virkishúsið Smæran er eitt virkishús fyri borgarar yvir 60 ár, har borgararnir sjálvir skapa virkistilboðini. KK er ognari av hølunum og rindar fyri rakstur av teimum. Eitt brúkararáð samskipar virkistilboðini.
- Kvøldskúlin – KK rindar fyri rakstur, leiðaraløn og læraralønir, har ein partur verður endurrindaður av Mentamálaráðnum.

## D. Hvørjir fyrimunir og vansar eru við verandi skipan?

- Verandi skipan er merkt av, at eldraøkið í dag er tvíbýtt millum land og kommunur, sum hava ábyrgd av hvør sínum pørtum av tí. Harumframt eru nakrir sjálvsognarstovnar, sum eru ein triði myndugleikabólkur í verandi skipan.
- Tað er trupult, tá ið fleiri myndugleikar hava ábyrgd og kunnu blanda seg uppí raksturin og avgerðir innan sama málsøki. Eisini kann tað til tíðir vera *trupult at skilja ímillum, hvør hevur ábyrgd av hvørjum, og hvør ger hvat.*
- Vandi er sostatt til tíðir fyri, at tvíbýtt ábyrgd = ongin ábyrgd.
- Skipanin, har landið sum ein fjarlagdur myndugleiki veitir árligar játtanir til ymsar stovnar í økinum, skapir ein vanda fyri ósunnari „kassahugsan“, har tað í størri mun kann fara at snúgva seg um at brúka „sína“ játtan, heldur enn at avmarkaðu játtanirnar til málsøkið verða samskipaðar og harvið betur gagnnýttar.
- Eisini er verandi skipan í ávísan mun merkt av „kongaríkjum“, við tað at fleiri sjálvstøðugir stovnar undir Almannaverki eru í økinum. Hetta hevur ovasta leiðslan í økinum roynt at fyribyrgt við sjálv at hava átikið sær leiðsluna fyri fleiri stovnar í økinum.
- Leiðslubólkur er skipaður í økinum undir Almannaverki – her er kommunan tó ikki umboðað.
- Sum visitatiónin er skipað nú, er hon miðsavnað undir eina og somu skipan fyri alt landið, og verður hetta ikki mett at vera nøktandi. Betur var, um visitatiónin er skipað lokalt sum ein felags visitatión fyri økið, tí fakfólkini har kenna betur borgararnar.

**2. Hvussu kann eldrarøktin skipast í økinum, tá hon verður kommunal?**

**a. Hvussu kundi eldraøkið verið skipað bygnaðarliga í økinum?**
*Starvsbólkurin er ikki heilt samdur um, hvussu bygnaðurin skal skipast, og tí hava vit tvey uppskot til bygnað.*

Uppskot 1

- Kommunurnar í økinum skulu hava evsta vald innan málsøkið, soleiðis, at gjald og vald, avgerð og ábyrgd fylgjast.
- Kommunurnar í økinum velja eitt ráðgevandi samstarvsráð, mannað við borgarstjórunum, sum útinnir eitt felags eftirlit við tí fíggjarligu, umsitingarligu og røktarligu stýringini av økinum.
- Ráðið, sum skipar virki sítt við føstum, regluligum fundum, skal kunnast um øll yvirskipað viðurskiftið innan málsøkið og kemur, við støði í hesum, við tilráðingum til kommunurnar í økinum um, hvussu økið best verður skipað og rikið. Ráðið skal somuleiðis viðgera roknskap og fíggjarætlan fyri málsøkið, sum eftirfylgjandi verða løgd fyri avvarðandi kommunur í økinum.
- Sjálv útinningin og umsitingin av málsøkinum verður skipað sum partur av KK – hetta fyri at spara óneyðugar eyka umsitingarútreiðslur við at gagnnýta tær skipanir og umsitingarligu deildir, sum KK frammanundan hevur. (Meir um hetta undir pkt. b).

Uppskot 2

- Kommunurnar í økinum velja eitt samstarvsráð, sum teirra vegna hevur ábyrgd av tí røktarligu, umsitingarligu og fíggjarligu stýringini av økinum.
- Hetta ráð skal so taka avgerð um og hava ábyrgd av, hvussu økið skal skipast og rekast.
- Ráðið kann útdeligera fakligu og fíggjarligu ábyrgdina á teir ymsu stovnarnar í økinum.

**Møguleikar og tilmæli um skipan av deildum og tænastum í økinum:**
***Visiónin skal vera: Sum longst í egnum heimi.***

- Tænastuveitingin frá Heimatænastuni skal optimerast, so møguligt verður hjá borgarunum at verða sum longst í egnum heimi.
- Dagtilboðið til minnisveikar, heimabúgvandi borgarar, sum heldur til á Búðatrøð, skal halda áfram, men vegna vaksandi tørvin hevur starvsbólkurin umrøtt eina betran av hesum tilboði, havandi í huga hølir í nýggja røktarheiminum.

- Umrøtt er eisini, at neyðugt er við virkistilboðum til teir borgarar, sum búgva á røktarheimunum/eldrasambýlunum. Hesi tilboð kunnu vera á sjálvum røktarheimunum/eldrasambýlunum ella aðrastaðni í býnum.
- Dagtilhaldið Sóljan, har málbólkurin er ikki-minnisveik eldri – sum fáa vegleiðing og møguleika at verða aktiverað í ein ávísan mun – kundi verðið flutt í onnur og betur hóskandi hølir, so umstøður verða til at taka ímóti øllum borgarum innan málbólkin, bæði heimabúgvandi og búfólkum á stovni.
- Virkishúsið Smæran er eitt tilboð fyri borgarar, 60 ár og eldri, sum møtast. Virkistilboðini her verða sett í gongd av brúkarunum sjálvum – *tey eru sjálvaktiverandi.* Ongi starvsfólk eru knýtt til virkishúsið. Hetta er í tráð við framtíðar eldrapolitikk, har dentur verður lagdur á, at fólk sjálvi taka ábyrgd og hava ávirkan.
- Ven og Virka er tilboð til pensjónistar, har dentur verður lagdur á fyribyrging.  Hetta tilboð er ein liður í hugsjónini um, at fólk sum longst skulu nýta sínar førleikar.
- Nú nýtt røktarheim verður tikið í nýtslu, verður hetta heimið, har eldri borgarar, sum ikki eru førir fyri at vera í egnum heimi, koma at búgva. Røktarheimið er bygt við íbúðum, so møguleiki er fyri at hava sína egnu íbúð og samstundis at hava møguleika til at fáa røkt og hjálp døgnið runt.
- Norðoya Røktarheim kann skipast við eini deild fyri fastbúgvandi borgarar, ið eru minnisveikir. Onnur deildin kann skipast við umlættingar/rehabiliteringsplássum fyri heimabúgvandi borgarar.

**b. Hvussu og hvar kundi eldrarøktin í økinum verið umsitin?**

*Eins og undir pkt. 2 a eru tvey uppskot til hvussu og hvar eldrarøktin kann verða umsitin.*

<u>*Uppskot 1*</u>

- Víst verður til pkt. 2, a, har mælt verður til skipan av einum samstarvsráði, mannað við borgarstjórunum í økinum.
- Við støði í nevnda, yvirskipaða leisti, verður sjálv útinningin av tænastunum og umsitingin av málsøkinum skipað sum partur av KK – hetta fyri at spara óneyðugar eyka umsitingarútreiðslur við at gagnnýta tær skipanir og umsitingarligu deildir, sum KK frammanundan hevur.
- Málsøkið verður umsitingarliga skipað sum partur av Trivnaðardeild býráðsins, undir Sosiala toyminum, har eldraøkið er ein partur.
    - Setast skal ein leiðari ella fulltrúi, sum fær yvirskipaðu, umsitingarligu ábyrgdina av eldraøkinum.
    - Síðani  verða deildarleiðarar settir á teimum ymsu stovnunum ella deildunum:

        - Ein deildarleiðari fyri Norðoya Ellis- og Røktarheimi
        - Ein deildarleiðari fyri Norðoya Vistarheim
        - Ein deildarleiðari fyri bæði sambýlini
        - Ein deildarleiðari fyri røktina úti
        - Ein deildarleiðari fyri nýggja røktarheimið í gerð
    - Deildarleiðarnir hava fakliga og fíggjarliga ábyrgd av hvør sinum økið.

Uppskot 2

- Samstarvsráðið skal sum partur av sínum arbeiði, tryggja, at umsitingin og arbeiðið av eldrarøktini í økinum verður framd á tryggan og effektivan hátt, soleiðis, at sum mest av játtanini verður nýtt til frama fyri tey eldri.

**c. Hvussu kundu ognarviðurskiftini av bygningum innan eldrarøktina í økinum verið skipað, tá eldrarøktin verður løgd út?**

*Eins og undir pkt. 2 a og b eru tvey uppskot til, hvussu ognarviðurskiftini av bygningum kundu verið skipað.*

*Uppskot 1*

- Mælt verður til, at ognarviðurskiftini verða tey somu sum í dag, tvs. at verandi eigarar av bygningum v.m. verða óbroyttir.
- Nakrir av bygningunum innan málsøkið eru undir sjálvsognarstovnum, har tað í viðtøkunum er ásett, at Føroya Landsstýri skal góðkenna keyp, sølu og veðseting av fastari ogn. Í sambandi við, at kommunurnar yvirtaka fulla ábyrgd av málsøkinum, verða nevndu viðtøkur at broyta, so at hesi rættindi liggja hjá kommununum, tvs. at allar kommunur í økinum verða góðkennandi myndugleikin.

*Uppskot 2*

- Verandi bygningar, bæði kommunalir og lands, sum verða nýttir í dag verða latnir til samstarvsráðið sum ogn.

**d. Hvørjir samstarvsmøguleikar eru í økinum, bæði millum land og kommunur og millum kommunurnar í økinum?**

**Her verður m.a. hugsað um demensøkið – sí framferðarætlan um demens á http://alzheimer.fo/**

- Verandi samstarv millum land (her verður hugsa um psykiatriska depilin) og kommunur er væl uppbygt, og verður mælt til at halda áfram við sama samstarvi.

- Eisini verður mælt til at seta á stovn ein depil fyri dement, ið skal virka sum eitt dagtilboð, har dementir borgarar kunnu koma dagliga. Tilboðið skal skipast soleiðis, at borgarar við demens í fleiri gradum kunnu koma. Ein møguleiki er, at hesin depil kann vera í hølum í nýggja røktarheiminum.
- Kommunurnar samstarva í dag um Dagtilhald og Serflutning, og verður mælt til at halda áfram við hesum samstarvi.

## 3. Annað

### a. Møgulig staðbundin viðurskifti, sum eru viðkomandi at lýsa.

*Eins og undir pkt. 2 so verður hesin spurningur eisini svaraður við tveimum uppskotum.*

<u>*Uppskot 1*</u>

- Besti leisturin at lata pening fylgja við útdelegeringini av málsøkinum er við at lækka landsskattin og hækka kommunuskattin eins nógv – hetta samsvarandi tí upphædd, sum eldraøkið verður metta at kosta, rakstrarliga og íløguliga.
- Á henda hátt fáa allar kommunur í økinum eina sjálvstøðuga, eyka skattainntøku, svarandi á leið til tann eykakostnað, sum yvirtøkan av eldraøkinum kostar hvørjari kommunu sær.
- Umráðandi er, at landið samstundis frásigur sær somu inntøkur, soleiðis at borgarin verður skaðaleysur av broytingini.
- Undir tí eftirliti og tí skipan, sum mælt verður til í hesum tilmæli verður sjálv umsitingin og fremjingin av tænastuni tó framd av KK sum tann størsta kommunan í økinum, ið sostatt setur øll starvsfólk í starv, avgreiðir lønir, umsiting etc. etc. Grannakommunurnar í økinum fáa síðan rokning frá KK eftir lutfallinum millum kommunurnar, har íbúgvatalið óivað er besti og stabilasti leisturin at brúka, tí harvið verða eingi óvæntaði sveiggj í millumkommunalu gjøldunum, sum kunnu koma (serliga smáum) kommunum í fíggjarligar trupulleikar.
- Samanborið við blokkjáttan, sum hevur verið frammi, er henda skattliga broytingin munandi betri og tryggari, tí vit vita frá royndum hjá grannalondum okkara, at blokkjáttanir til eitt málsøki frá landi til kommunur, sum hava ábyrgina av økinum, er ein svikalig skipan, har landið ofta hevur lyndi til at skerja játtanina og harvið senda trupulleikan at spara yvir á kommunurnar, sum eru verjuleysar í tí høpinum.

<u>*Uppskot 2*</u>

- Í samband við, at eldraøkið verður lagt frá landinum til kommunur at umsita, eigur fíggjarliga uppgerðin at byggja á, at landið letur pening fylgja við.

- Uppgerðin eigur at byggja á ta upphædd, sum landið í dag nýtir til hetta endamál, og sum frameftir verður javnað við prístalinum pluss øking við talinum av brúkarum .
- Peningurin verður latin samstarvsráðnum, sum fær fíggjarligu ábyrgdina .
- Harafturat eigur samstarsvsráðið at fáa tilsvarandi pening frá kommununum í økinum, sum í dag verður nýttir til eldraøkið, eisini prístalsregulera + øking av brúkarum.
- Samstarvsráðið fær so ábyrgd av at nýta hesa upphæddina til eina so góða og fjølbroytta tænastu til tey eldru sum gjørligt.

Hjáløgd eru eisini skriv, sum eru send til Almannaverk við uppskotum um optimering av tænastum.